um vit koma at hava búskaparvøkstur yvirhøvur. Vit mugu og skulu fáa okkara útbúna fólk heim. Tað krevur størv, og at tey fáa nakað at búgva í og børnini hjá sær ansað. Nøkur av størvunum mugu verða innan gransking og útbúgving, sum eru avgerandi fyri, at vitanarvinnur kunnu mennast og trívast. Men vit mugu samstundis taka tað í størsta álvara, at vit tryggja hesum fólkunum, at tey kunnu fáa børnini ansað, tá ið tey flyta heim. Ansingargaranti má vera loysunarorðið. Annars koma hesi fólkini ikki heim. So einfalt er tað. At tosa um at spara upp á raksturin heldur enn í íløgunum er tí púrasta burturvið.

*Spyrjari: Nú komu vit umvegis sosialpolitikkin inn á vinnupolitikkin aftur. Tú nevndi vinnupolitikkin sum ta einu av trimum súlum saman við ES-atlimaskapi og ríkisfelagsskapinum. Men hvør er hann í grundini hjá Sambandspolitikkinum?*

- Eg haldi, at hasin spurningurin kann verða svaraður í tveimum. Fyri vinnuna her á landi er tað altavgerandi, at vit veruliga fáa gransking at gagna vinnuna og at leggja lunnar undir nýggjum vinnum. Her mugu vit leggja nógv fyri og ikki bara játta eitt eiti fyri at hava ryggin frían. Tað, sum eg síggi fyri mær, er, at vit gera eitt institutt fyri fiskavørum. Tað skal vera knýtt at Fróðskaparsetrinum. Ella eitt gastronomiskt institutt, sum bæði kann gagna fiskivinnuna og ferðavinnuna um eina leið. Og so eitt, sum so mangan hevur verið upp á tal, men ongantíð veruliga fingið eina undirtøku við teimum pengunum, sum tað krevur: Eitt altjóða institutt fyri havfrøði.

*Spyrjari: Og hitt, tú ætlaði at taka fram í sambandi við vinnupolitikkin hjá Sambandsflokkinum?*

- Tað er ein vinna, vit sjáldan tosa um. Og mangan ikki síggja. Tekur tú Hvítu Bók sum dømi, so verður sagt, at vit bert hava fiskivinnuna og teir donsku pengarnar at dúva á. Hetta er ikki rætt. Vit gloyma heilt teir nógvu pengarnar, sum m.a. sjómenn, sum sigla við Mærsk vinna til landið og landshúsarhaldið. So eg vil siga, at vit eiga at duga nógv betur at gagnnýta hetta slagið av møguleikum. Tað, eg kundi nevnt her, er at vit fáa eina nógv betri FAS-skipan. Tað vil siga, at vit skipa so fyri, at tað verða ikki bert føroyingar, ið vinna pening til landið, men at vit eisini fáa pening burtur úr útlendingum, sum ganga undir eina føroyska FAS-skipan.

*Spyrjari: Nú eru tit í samgongu. Og hóast hon kanska ikki heldur valskeiðið út, so standa tit tykkum væl í veljarakanningum, so tað er væl hugsandi, at tit verða í samgongu eisini aftaná eitt komandi val. Hava tit í Sambandsflokkinum nøkur serlig ynski til ta optimalu samgonguna, ið kann vera við til at fremja tann politikk, tit vilja hava førdan?*

- Nei, vit hava onga serliga preferansu. Har síggja vit møguleikar fleiri vegir.

*Spyrjari: Um tit koma í samgongu, hvørji málsøki vilja tit so leggja tykkum eftir at fáa?*

- Vit kundu hugsað okkum øll málsøkini, tí vit hava nøkur mál, vit kundu hugsað okkum at framt innan øll øki. Tað er ringt at taka nakað framum annað, so tað má ein samráðing avgera, hvat ið ber til.



*Seinastu nógv árini hevur Kaj Leo Johannesen sitið sum formaður í Sambandsflokkinum*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Sambandsflokkurin á løgtingi

## Vald umboð

Sambandsflokkurin hevur altíð verið ein av størstu flokkunum á tingi. Eins og Sjálvstýrisflokkurin hevur Sambandsflokkurin góð hundrað ár á baki. Fyrstu mongu árini stríddust teir báðir einsamallir á tingi um at vera hin størri. Eftir seinna heimsbardaga, tá ið vit fingu eitt øðrvísi flokkamynstur við fýra stórum flokkum og so úr einum og upp í fleiri smærri flokkar, hevur Sambandsflokkurin verið ein av teimum fýra stóru. Tað minsta hann hevur fingið, var í 1998, tá ið hann fekk 18,1 %. Tað frægasta úrslitið var í 1950, tá ið flokkurin fekk 27,3 %, men uttan at gerast størsti flokkur – Fólkaflokkurin fekk størri undirtøku á tí valinum. Við tvey tey seinastu valini í 2002 og 2004 fekk hann flestar atkvøður. Tað hevði hann roynt fyrr. 1954, 1978, 1980 og 1994 var hann somuleiðis størsti flokkur. Sambandsflokkurin hevur í dag 7 umboð á løgtingi.

Upp og niður – og upp - í veljarakanningum.

Síðani seinasta løgtingsval januar 2004 hevur tað gingið bæði upp og niður. Á seinasta løgtingsvali fekk flokkurin 23,7 %. Í teimum fyrstu kanningunum í 2006 gekk framá. Ein kanning hjá Gallup gav flokkinum 3 prosent framgongd, men síðani vendi, og hann kom heilt niður á 19,6 % í einari kanning í mai í ár. Seinasta kanningin hjá Gallup í august gevur honum tó góðar vónir um eitt gott løgtingsval, tí hon gevur honum 24,6 %. Flokkurin leypur fram: Fimm prosent síðani kanningin í mai, og eitt prosent síðani seinasta val, har hann fekk flestar atkvøður.

## Meðal hampa flokkur

Flokkurin er borgarligur flokkur. Liberalur; og konservativur við denti á tað sosiala. Hyggja vit at, hvussu veljaraskarin er samansettur sosialt, so síggja vit, at løntakaraveljararnir býta seg, so hann líkist landinum sum heild. Í so máta er býtið ímillum sambandsveljarar næstan ein spegilsmynd av landinum í síni heild.

Við í nógvum samgongum.

Sambandsflokkurin er í løtuni í einari ABC-samgongu. Tað vil siga saman við Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum. Hann er ikki óvanur við at vera í samgongu, flokkurin hevur verið í 12 av teimum 22 samgongunum, ið hava verið í eftirkrígstíð. Tað er ikki meira enn góð helvt, men Sambandsflokkurin hevur verið við í fleiri av teimum drúgvu samgongunum, so tá ið vit telja ár, so tosa vit um næstan 39 ár tilsamans av umleið 59 árum.

## Nógv ar løgmenn

Sambandsflokkurin er næst eftir Javnaðarflokkinum tann flokkurin, ið hevur havt flestar løgmenn. Seinast hann átti løgmann, var 1994-1998, tá ið Edmund Joensen sat í hesum sessinum. Men annars hevur flokkurin átt løgmannin í 7 av teimum 12 samgongunum, hann hevur verið partur í. Við seinasta val fekk flokkurin flestar atkvøður, og átti at kunna kravt løgmann, men tað at formaðurin, Lisbeth L. Petersen legði frá sær sum formaður stutt eftir valið, og áðrenn nýggja samgonga var skipað, gjørdi tað ómøguligt hjá flokkinum at bjóða seg fram við løgmansevni. Við góðu veljarakanninginí í rygginum kann hann so gera sær betri vónir til aftaná valið, ið stundar til.